

*Sambært veljarakanning í síðstu viku eru tað tey bleytu virðini sum útbúgving, ið eru inn millum føroyingar*
*Savnsmynd*

á, at "bleytu virðini" verða kannað og definerað. Tí sum nú er hanga tey nærum í leysari luft sum eitt slag av moralskum boðskapi uttan nágreiniligt innihald.

## Hvat eru bleyt virði?

Trupulleikin við hugtakinum "bleyt virði", er at tað ikki er so lætt at avmarka hvat hetta merkir. Merkir tað "alt annað enn betong og asfalt"? Og hví verður tað nevnt sum bleyt virði at byggja skúlar og barnagarðar? Krevja slíkar verkætlanir ikki eisini eina rúgvu av betongi og asfalti?

Ella er tað heldur soleiðis, at "bleyt virði" eru tey økini, ið krevja beinleiðis umsorganarligt samband við onnur menniskju, til dømis sjúkrahúsverkið, almannaverkið og undirvísingarverkið?

Men hví eru tað ikki eisini bleyt virði, at samferðslan riggar sum hon skal, at fysisku arbeiðskarmarnir eru nøktandi, og at bústaðirnir eru sniðgivnir við atliti til lokalar veðurlagstreytir og í samspæli við umhvørvið annars? Øll hesi tingini hava avgerandi týðning fyri at gerandisdagurin hjá fólki skal vera optimalur.

Alt samanumtikið er tað ringt at avgera hvat fólk meina við, tá tey tosa um hørð og bleyt virði. Og tað er ein trupulleiki. Løgtingsvalstríðið kann ikki liva við, at fokus verður flutt frá veruligum evnum til eitt hálvmoralsktkjak um "harðar pakkar" og "bleytar pakkar". Neyðugt er at finna út av hvat er í hesum spennandi pakkunum, ið verða lagdir undir tað politiska jólatræið í hesum tíðum.

* *http://www.gopetition.com/online/15622.html*



*Hørðu virðini sum tunlar eru yt millum størstapartin av føroyingum, vísir nýggj veljarakanning*
*Savnsmynd*